# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

# Kultskaldsøga fær nýtt lív

26 ár eftir at hon kom út á fyrsta sinni, vekir kultskaldsøgan *Gentlemen* eftir Klas Östergren nú aftur miklan ans

**NÝÚTGÁVA**
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

At bøkur hava lyndi til at liva sítt egna lív er 26 ára gamla kultskaldsøgan *Gentlemen* hjá svenska rithøvundanum Klas Östergren nýliga vorðin eitt rættiliga gott dømi um. Herfyri flokkaðist danska pressan um Östergren – ikki so nógv fyri at fregnast eftir framhaldinum av *Gentlemen*, *Gangters*, sum júst er komin út, men tí gamla kultskaldsøgan júst er týdd til danskt ...



*Við endurútgáuni av 26 ára gomlu kultskaldsøguni Gentlemen, hevur svenski høvundurin Klas Östergren fingið enn ein nýggjan lesaraskara*

### Skaldslig symbiosa

Orsøkin til at Östergren var í Danmark, var nú eisini at gera reklamu fyri donsku týðingini av *Gentlemen*, ið danskir ummælarar nú um dagarnar umtala sum "stóra svenska skaldsøgulist". At tað tók teimum so langa tíð at fáa eyga á bókina heldur høvundurin vera enn eitt prógv um, at danir og svenskarar eftir øllum at døma ikki lesa bókmentirnar hjá hvørjum øðrum.

Hvat gamla bókin hevur at siga lesararum í dag, dugir hann ikki at meta um, men viðgongur tó sjálvur, at tað kendist heilt øðrvísi at lesa hana aftur, í sambandi við framhaldið, enn tá hann sum 23 ára gamal skrivaði bókina.

– Tað er ein heilt onnur bók, eg nú havi lisið umaftur. *Gentlemen* snúði seg í ávísan mun um, hvussu tað er at liva her og nú. Also í 1978. Sjálvur vendi eg mær ímóti tíðarinnar stættastríðsbókum. Mínir høvuðspersónar binda slips við Windsorknúti, eins og eg sjálvur gjørdi í eini tíð, tá høvundar helst skuldu ganga í skipstroyggjum og hava fullskegg, segði Östergren við Information herfyri.




At bókin nú knappliga hevur fingið ein nýggjan lesaraskara, eisini í Svøríki í sambandi við endurútgávuna, hongur møguliga saman við, at svenska samfelagið er vorðið so nógv meir einsháttað, heldur høvundurin. Sjálvur hevði Östergren ongantíð ímyndað sær, at hann skuldi skriva eitt framhald av *Gentlemen*. Tað var ikki fyrr enn hann nærkaðist sínum 50 ára føðingardegi, at persónarnir frá bókini byrjaðu at rusast við aftur í huganum hjá høvundanum – kanska tí bókin sum so ongan enda hevði, grunar Östergren.

– So eg byrjaði at skriva, og brádliga fingu persónarnir lív av nýggjum. Eftir mínum tykki er *Gentlemen* vorðin betri av *Gangsters*, og *Gangsters* hevði verið vánaligari uttan *Gentlemen*. Okkurt slag av skaldsligari symbiosu er hend, sum eg ikki hevði ímyndað mær frammaundan, sigur høvundurin.

### Góðtekur ikki endar ...

*Gangsters* er ikki eitt vanligt framhald av eini skaldsøgu. Meðan *Gentlemen* snýr seg um, hvussu ein týðing av *Det röda rummet* hjá Strindberg bleiv, ella kanska ikki bleiv til, snýr *Gangsters* seg um, hvussu *Gentlemen* bleiv til. Ljóðar sum eitt typiskt dømi um metaskaldskap, men tað hevur ikki verið ætlanin hjá høvundanum.

– Mær dámar ikki hugtakið "metaskaldskap". Tað kom mest sum bara av sær sjálvum, at ein 50 ára gamal ikki kann taka skrivingina hjá einum 23 ára gomlum upp aftur, sum um onki var hent. Tí er *Gangsters* meir eitt slag av viðmerking, sigur Östergren, sum viðgongur, at hann ongantíð hevur lært seg ein ávísan framferðarhátt, tá hann skrivar. Hugskotini liva sítt egna lív og koma, tá tað passar teimum. Tí hevur hann eisini ilt við at góðtaka endar

– Veruleikin endar jú ikki. Hann verður bara til okkurt annað. Tí er tað eisini eitt løgið fyribrigdi, at vit so fegin vilja hava ein enda. Tað minnir kanska eitt sindur um tankan um tað fullkomna menniskja, sigur Klas Östergren.

# Gentlemenninir í reyða rúminum




Klas Östergren, Gentlemen (1980)
Týtt til danskt, Nina Bolt
Tiderne Skifter, 2006

Bókin byrjar við, at vit hitta tann niðurundirkomna unga høvuðspersónin Klas Östergren, sum ørkymlaður gongur runt í síni tómu íbúð og spyr seg sjálvan, hvat varð av tí lovandi rithøvundanum, hann var, fyri bert einum ári síðani. Tíðin verður síðani skrúvað eitt ár aftur, har Klas júst hevur fingið til uppgávu at skriva eina nýggja týðing av *Det röda rummet* eftir Strindberg. Men trupulleikar stinga seg upp, og Klas fær ikki rættiliga gongd á arbeiðið. Í staðin rennir hann seg í tann gátuføra boksaran og klaverleikararn Henry Morgan og flytir inn í íbúðina hjá honum. Sum fra líður flytir beiggi Klas, Leo, eisini inn í íbuðina. Hesin var einaferð ein nógv róstur yrkjari, men býr nú fyri tað mesta á sinnisjúkrahúsi.

Síðani kemur ein tíð, har hesir tríggir mest at kalla spæla eina modernaða og óunniliga útgávu av *Det röda rummet* við pengatrupulleikum, ógoldnum marglætismáltíðum, druktúrum og kvinnum, ið hava sæð betri dagar. Lýsingin av teirra dekadentu lívsførslu verður samstundis ein lýsing av einum kyniskum svenskum vælferðarstati, gjøgnumsúrgaður av korruptión, gølum og vina og kenninga politikki. Spakuliga verða Henry og Leo dringnir ikki í okkurt av nógva undirgrundarvirkseminum, sum Klas nær at fortelja um, áðrenn teir báðir brádliga hvørva.

Aftur í nútíðini stendur gátuføra elskarinnan hjá Henry ein dagin í durinum hjá Klas og lovar at fortelja honum sannleikan um, hvat hendi við teimum báðum. Ein sannleika, Klas helt seg kenna, men sum framhaldið av bókini, *Gangsters*, varpar eitt heldur øðrvísi ljós á.

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**

Vit gera bøkur frá uppseting til liðugtgerð. Við drúgvastu royndunum innan bókaprent er tín bók í góðum hondum hjá okkum

Føroyaprent

tel. 314 555, www.foroyaprent.fo